LÝSINGARTORGIÐ

Lýsingatreytir fyri ókeypis lýsingar:
privatar lýsingar
í mesta lagi 40 orð
bert ein lutur í hvørjari lýsing
hægsta søluvirði 20.000 kr.

Lýsingar, gjaldast skal fyri:
Vanl. lýsingaprísur:
frá fyritøkum og virkjum
fleiri enn 40 orð
søluvirði, ið Sosialurin metir oman fyri 20.000 kr.

tó minst 70,- kr. við MVG hvørja ferð:
Lýsingar, gjaldast skal fyri:
70,- kr. við MVG hvørja ferð:
lýsingar undir teigunum:
»Dansur«, »Fundir« og »Matur« Bill. merktar

Akfør

TIL SØLU
Óvirkin Saab 900, kann brúkast sum eykalutir.
Tlf. 260334, Lise

TOYOTA CAMRY 2.0 xli
árg. 89, koyrt 157.000 km. Prísur 25.000 kr.
Tlf. 225479

NISSAN SUNNY 1.4
til sølu, árg. 91, svartur, koyrt 121.000 km. Bilurin er í sera góðum standi og sproytaður fyri 3 árum síðani. 4 felgur við nýggjum píkadekkum fylgja við.
Tlf. 424628

NISSAN MICRA
árg. 88, við aut. gearum. Hevur koyrt 80.000 km, góðan motor, hevur nøkur brek og stendur fyri sýni, verður seldur biliga.
Tlf. 316762 eftir kl. 17

HYGG HER!
Ein Daihatsu Charade G100, árg. 07/87, km 186.000, nýsýnaður 07/02, 5 hurðar, lit. Grønur, koyrir væl, 10.000 kr.
Tlf. 212839

TOYOTA CARINA II
árg. 85, til sølu fyri 5000 kr. Píkadekk á felgum fylgja við.
Tlf. 263373 ella 451079

HONDA CIVIC 1.6 LSI
Nýsýnaður juli 2002, nýlakeraður, svartur við 2 hvitum fartstrípum, centrallás, el-spegl, el-rútar, sportfelgur, cd-anlegg, forsterkari, subwoofari og hátalarum til sølu.
Tlf. 220588

ALU-FELGUR
passa til Opel Ascona. 100 kr.
Tlf. 447254

NISSAN SUNNY 1.6 SLX
árg. 86 til sølu fyri 11.000 kr. Pioneer bilstereo v/ CD spælara fylgir við í keypinum.
Tlf. 256049

HONDA CIVIC
til sølu, árg. 10/98, koyrt 65.000 km.
Tlf. 222738

SPORTFELGUR
til Mazda 626 og til Mazda Premacy 5 hol. Til sølu fyri 3.000 kr.
Tlf. 448935

TOYOTA COROLLA 2.0D
st. car., árg. 96, til sølu. Sony CD stereo anlegg og sportfelgur fylgja við. Sær gott út og er økonomiskur (uml. 17 km pr. ltr.) ikki roykt í bilinum. Prísuppskot: 85.000,- Áhugaði kunnu ringja
tlf. 215106

FORD MONDEO
1.8 TD í sera góðum standi, árg. 98 til sølu.
Tlf. 213767 eftir kl. 18

MAZDA 626
146.000 km, árg. nov. 97. Bilurin hevur sportfelgur og vanligar felgur við píkadekkum. Til sølu um hóskandi boð fæst.
Tlf. 218855

ROVER 200
árg. 99 til sølu, hevur koyrt 40.000 km.
Tlf. 260711

SPORTFELGUR
Sportfelgur við nýggjum summardekkum til sølu. Passar til Honda Civic. Prísur: 2500 kr.
Tlf. 211439, Teitur

TIL SØLU
Hvítur Citroen BX biliga til sølu. Koyrt 127.000 km. Koyrir sera væl.
Tel. 322269

EYKADEILIR TIL NISSAN
Hevur tú nakrar eykadeilir t.d. h.hurð framman til ein Nissan Sunny, n13, árg 89
ring 317376

CITROEN XANTIA D
árg.96, til sølu fyri kr. 85.000,-
Ring 444951 gerandisd. kl. 9-16

MERCEDES E300
Diesel, aut. gear, árg. 96, til sølu fyri 275.000,-
Tlf. 444951 gerandisd. kl. 9-16

CHEVROLET VAN G20
6,2 V8 Diesel, árg. 96, treingir til ábøtur, til sølu.
Tlf. 227922

HONDA ACCORD 2.0 EX
til sølu fyri 5.000 kr. Krevur ábøtur.
Tlf. 312945

TVEIR CITROËN AX 1.1
bíliga til sølu. Annar hevur plátur, men báðir í rimiligum standi. Minsta boð 8.000 kr., 1 sett av sportfelgum, 2 sett summardekk, 1 sett píkadekk fylgja við. Verða seldir vegna flyting.
Tlf. 228310

BMW 316i
árg. 12/92, km 162.000, sleipikrók, í góðum standi, til sølu fyri hóskandi pris.
Tlf. 313902

MAZDA 323
árg. okt. 86 til sølu.
Tlf. 262324 ella 449455

OPEL OMEGA 2.0i
árg. 87. Sýnaður juli 2002.
Tlf. 253707

FORD SIERRA 2.0 CL
árg. 1990 til sølu. Bilurin er í góðum standi.
Ringið 226087 ella 441338

AUDI 100
Ein vælviðfarin Audi 100, 2.0E, 5.cyl., árg. 9/88, km. 121.000, powerstýring, sentrallás, sóltak, CD-stereoanlegg v. 10 CD-skiftara, til sølu.
Tlf. 320014

TOYOTA CARINA II 2.0
XLI Touring. Bilurin er nýsýnaður.
Tlf. 421196

MITSUBISHI COLT
árg. 1990 biliga til sølu. Hevur koyrt lítið, sær gott út bæði innan og uttan.
Tlf. 265622

GØR ET GODT KØB
4 næsten nye vinterdæk mrk. »Bridgestone« på fælge str. 155/70 R13. Kun kørt 1 måned. Nypris 4.450,-. Sælges for 2.950,-
Tlf. 250338

TIL SØLU
1 felga er skeiv, 3 eru í lagi. Dekk eru á øllum 4. Passar til BMW. Model E36. Prísur: 500,- kr.
Tlf. 228503

TIL SØLU
Tveir óbrúktir forskermar til Mitsubishi Pajero, árg. 86.
Tlf. 448402 ella 218402

MITSUBISHI PAJERO
árg. 86, settur, ongi nummarspjøldur. Møguliga kunnu fleiri góðir deilir fáast burturúr. Setur aftan, longra modellið.
Tlf. 448402 ella 218402

PEUGEOT 406 TIL SØLU
136 HK aut. gear, árg. 08/97, koyrt 85.000 km.
Tlf. 222165

OPEL CALIBRA
Svartur Opel Calibra 2.0i, árg. 91 við 140 Hk til sølu. Bilurin hevur m.a sóltak og sportsfelgur vm. Stórt annlegg kann fylgja við um ynskist. Áhugaði
ringið 212740

TOYOTA CAMRY 2.0 XLI
SV21 árg. 87 til bíliga til sølu. Sýnaður í des. 2001.
Tlf. 211990

DEILIR TIL HONDA CIVIC
árg. 88-91 til sølu. Motorur 1.4, gearkassi, rútar, hurðar og annað.
Tlf. 211990

Amboð

FLYMO TURBO GRÆSKLIPPER
Ny Flymo turbo græsklipper med opsamlingskurv og stor klippebredde til salg for 1.500 kr. Opr. 2.700 kr.
Tlf. 317075

SLÁIMASKINA
Ein Teilburger T33 bíliga til sølu.
Áhugaði ringið tlf. 212687

Arbeiði

ARBEIÐI YNSKIST
15 ára gomul genta søkir arbeiði. Alt hevur áhuga, helst aftaná skúlatíð.
Tlf. 318667 ella 253063, Súsanna

GENTUR Í HÚSIÐ
Eg, sum eiti Arndis og maður mín, ið bæði eru av føroyskari ætt, vildu fegin haft eina føroyska gentu í húsið at passa dreingirnar hjá okkum, sum eru 4 ár og 9 mør gamlir. Vit skilja føroyskt, men tosað lítið av tí. Vit kundu hugsa okkum at tú er um 17-20 ára gomul.Eg havi eina vinkonu, sum eigur trý børn og hon er eisini áhuga at fáa føroyska gentu í húsið. So tað hevði passa væl, um tað vóru vinkonur, ið komu til Íslands. Um áhugi er at vita meira, so skriva til okkum á e-mail: jsja@li.is og fá meira at vita um arbeiðstíð, løn o.a. Vónandi kunnu tit byrja fyrst í september.
E-mail: jsja@li.is

ARBEIÐI SØKIST
Maður søkir arbeiði, hevur stóra koyrikorið og kann koyra mest sum allar maskinur.
Vinarliga ringið á tlf. 265535

Barnaansing

BARNAANSING
Kvinna søkist at ansa tveimum gentum, 7 mør. og 2 ár, í Havn, skjótast gjørligt. (Helst ein ið hevur børn). Vinarliga ring
tlf. 227093

Barnaútgerð

BRIO KOYRISTÓLUR
Ein Brio koyristólur, bláur við smáum blomstrum, til sølu fyri 500 kr.
Tlf. 361185

BARNAVOGNUR TIL SØLU
Ein vælhildin svartur Silvercross barnavognur til sølu.
Tlf. 451023 ella 261209

SIMO KOMBIVOGNUR
Ein lítið brúktur Simo kombivognur til sølu. Við vogninum er lyft, madrassa, koyriposi, regnslag og barnaselar. Vognurin er bert nýttur til eitt barn.
Tlf. 455808

KOYRISTÓLUR
Koyristólur við galesju og regnslag.
Tlf. 441216

TIL SØLU
Barnavognur til sølu.
Tlf. 321646 ella 261646

TIL SØLU
Silver Cross barnavognur (vínreyður). Britax bílstólur frá 0-mør. 550 kr. Hokus pokus stólur 550 kr.
Tlf. 333933

STÓRUR
og góður barnavognur við lift og regnslag til sølu. Prísuppskot: 1800 kr. Ring og hoyr nærri á
tlf. 317078 ella 228310

Bátaútgerð

10-MANNAFAR
til sølu um hóskandi boð fæst.
Tlf. 221913 ella 322762

TIL SØLU
Eldri frambygt 8-mannafar við 10 HK Sabb motori til sølu fyri kr. 10.000. Hummenbird ekkoloddi er í bátinum. Báturin hevur ikki fiskiloyvi.
Tlf. 423274

6-MANNAFAR
(22 fetur) við 10-HK Sabb-diesel til sølu. Báturin er smíðaður í 1983. El-start, sjálvvirkandi el-lensipumpu og VHF. Klárur at nýta.
Tlf. 220172

GLASTREVJABÁTUR
til sølu. MYRA 22 fót, 22 hesta Saab, árar, VHF og hondsnellur.
Tlf. 457286 eftir kl. 19

VHF TIL SØLU
Ein lítið brúktur VHF'ari til sølu. Prísur 3.900,-
Tlf. 315634

BERBARUR GPS'ARI
Magellan 310, 100 Way Points v.m. til støddar sum ein fartelefon. Lítið brúkt, bert 4 mør. gomul. Til sølu fyri 1250 kr.
Tlof. 332982 ella 266070

HVALVÍK 900
30 fót við fiskiloyvi, 35 svøvla línur, egningatrakt, gogguknúsari, 1 Koden GPS, 1 Simrad cp 40/50 DGPS kortplottari, 1 Koden cvs-812c ekkolod 2 botnar, 1 Storno fartelefon, 1 Sommerkamp 5 W sendari, 2 Sailor VHF, sjálvstýrari, 1 Raytheon r 20x24 fjr. radari, línuspæl, 4 aut. hydraulik snellur, 1 Beta/Ford bd 6 128 hk motor, 1 hjálpimotor 12 hk Beta Marine, oljukabys og alla kravda neyðútgerð. Prísuppskot: 575.000 kr.
Tlf. 224496 ella 457860

LÍNURULLA
Ein nýggj línurulla til sølu (Íslandssnið).
Tlf. 447692

ORRSKÄR 27 TIL SØLU
Báturin er frá 1979, er 2,95 m. breiður og hevur ein Volvo Penta 130 hk., diesel. Mesta ferðin er 18 mil. Báturin hevur: 4+2 koyggjupláss (10 sitipláss). 300 l. brennioljutanga. 120 l. feskvatnstanga. Toilet v/ septiktanga. Vask. Gasskomfýr við 3 blussum ovni. kuldaskáp og frystiskáp. nýggja kalesju, sólorkuskipan, WHF og Walkie Talkie og Ekkolodd og serstakan dýpdarmátara. Prísuppskot 300.000 kr.
Tlf. 213976

Bingo

GOTT BINGO
verður í Pálsstovu mánakvøldið 26. august kl. 19.00. 15 plátur 100 kr. Á lutaseðlinum 15 vinningar. Høvuðsvinningur vikuskiftisflogferð.
Astma- og Allergifelagið

BINGO
verður í Pálsstovu leygardagin 24. august kl. 15.00. full pláta 500 kr. + síðuvinningar. Á lutaseðli ein Apex flogferð til DK. Bingola. Eyka spæl. Koyring heim.
Kiwanisfelagið Rósan

FRÁ EYDNUNI
Gott bingo verður sunnudagin 25. august kl. 16.00. Full pláta 400 kr. Høvuðsvinningur á lutaseðli 1000 kr. Eykaspælið 1400 kr. Drigið verður millum spelini.
Eydnan

VINN EIN TARV
Tygum fáa tarvin døgurðaklára frá MBM, ialt eru 15 vinningar. Seðlar fáast til keyps á øllum Shellstøðunum kring landið. og á tlf. 225200.
Bygdarfelagið Báran í Árnafirði

ARGJA RÓÐRARFELAG
hevur gott bingo hósdagin 22. aug. kl. 19.00. Full pláta 400,- 6.-12. spæl 600,- Á lutaseðli 1 x 1500, 1 x 1000, 2 x 500. Eykaspæl. Koyring heim. 15 plátur 100 kr.
Argja Róðrarfelag

Bøkur

TIL SØLU
Falkenstjerne Dansk Litteratur bind III fra Tom Kristensen til Nutiden - 100 kr. Falkenstjerne Dansk Litteratur bind II fra H. C. Andersen til Johannes V. Jensen - 100 kr. Falkenstjerne Dansk Litteratur bind I fra Oldtiden til Aarestrup - 100 kr. New Swan Shakespeare, Macbeth incl. York Notes Advanced - 50 kr. D. H. Lawrence, The Virgin and the Gipsy incl. Workbook - 30 kr. Oscar Wilde, The Importance of Being Earnest - 25 kr. Robin Williams, Dead Poets Society - 30 kr. Aase Herskind m.fl., Engelsk grammatik med synonymer - 50 kr. Craig Donnellan, The Cloning Issue, Issues, Volume 12 - 30 kr. Kári Jespersen m.fl., Søgufróði, kelduviðgerð og háttaløg - 75 kr. Knud Helles m.fl., Store linjer i Verdenshistorien - 75 kr. Annfinnur í Skála, Stjórnarskipanar málið 1946 - 75 kr. Kristen Brix m.fl., Slóðir - 75 kr. Jonhard Mikkelsen, Gísla søga Súrssonar - 50 kr. Einar M. Gudmundsson, Alheimsins Einglar - 75 kr. Niels S. Hansen m.fl. Grundbog i biologi II - Menneskets biologi - 50 kr. Niels S. Hansen m.fl. Grundbog i biologi I - Økologi - 50 kr.
Tlf. 317075

SKAL TÚ Á HF ELLA STUDENT
Til sølu Støddfróði: Formlasavn C, 1 til HF og Studentaskúla, grundbók Pól Jespersen. Týskt: Mein teures Bein. Grundbog Tysk grammatik. Einfach so. Jenseits der Stille. Spanskt: Nøgle til de spanske verber. En Vivo, tekstbog. Enskt: The entrance. Fejlstøvsugeren. Føroyskt: Heiðin hind. Biolog: Ram på biologien. Ring á 259330 og hoyr nærri um prísin…
Tlf. 259330

BØKUR TIL
Sjúkkrasystraútbúgvingina. Ymiskar bøkur til sølu, so sum Almen Sygepleje 1., 2. og 3.
Tlf. 333315 ella 223417

Burturm. /funnið

KIKARI
Kikari mistur á regatta-túrinum Eiði-Hósvík-Nólsoy, Vinarliga ring
tlf. 214477 ella 312995

GRÁUR FRENSUR
Okkara myrkagrái frensur við hvitari bringu er burturvilstur í Havn. Hevur tú sæð hann onkustaðni, ring so til okkara á
nummar 225038

FARTELEFON
Ein blá Nokia fartelefon burturmist á ólavsøku í Havn. Finningarlon verður givin. Hevur tú funnið hana, vinarliga ring
tlf. 361452

TÚ,
sum tók húgvu mína á ólavsøkukonsertini, verður biðin at lata hana aftur! Húgvan er frá Sirri og er tann einasta av sínum slag. Hon hevur ein reyðan tríkant á síðuni og er hvít og morreyð.
Tlf. 224378

Býli

KOLLEGIUKAMAR
til framleigu frá 1.09.2002 til 1.02.2003 í Nærum. 45 min. við bussi til Keypmannahavn. Nærhendis DTU.
Tlf. 314032

HÚS Í MIÐVÁGI
Hús í Miðvági til leigu.
Tlf. 217727

KAMAR TIL LEIGU
Kamar til leigu í Hornabø til gott fólk.
Tlf. 228063

HÚS TIL LEIGU
Hús við góðum útsýni til leigu í Suðurstreymi. Frá uml. 1. September 2002 eru eini stór hús til leigu í Suðurstreymi. Møguliga við forkeypsrætti. Húsini eru innrættaði við m.a. tveimum stovum, stórum økki, trimum sovikomurum, tveimum baðiverilsum. Tilsamans uml. 145 m2. Eisini er ein óinnrættaður kjallari, uppá uml. 100 m2 sum er vælegnaður sum t.d. goymslurúm. Húsini hava eisini stóra altan við carport undir. Húsini liggja í sera barnavinarligum umhvørvi har stutt er til bæði vøggustovu/barnagarð og skúla. Útsýni er frábara gott. Góðir parkeringmøguleikar. Eini hús við nógvum møguleikum. Depositum verður kravt.
Áhugaði ringið 26 71 85

HÚS Í SANDAVÁGI TIL LEIGU
frá 23. sept. triggjar hæddir. Miðhædd: økur, wc v/brúsu, 2 stovur. Loft: 4 kømur, wc (bað). Nýumvæld innan. Rundanum: Garður og grasvøllur. Frálikt útsýni.
Tlf. 333933

ÍBÚÐ Í KBH.
1 ver. íbúð í Husum til sølu. Gott bus- og toksamband, 20 min. til miðbýin. Íbúðin er partvís møblerað, nýístandgjørd og klár at flyta inn í. Prísur: Kr. 400.000,00
Tlf. 224524 ella 421180 e. kl. 17

ÍBÚÐ YNSKIST
Eg og 4 ára gamla dóttir mín ynskja íbúð í Tórshavn, havi fast arbeiði og vit fara væl um. Royki ikki.
Bill.mrk. 1405/2

SETHÚS Í SØRVÁGI
Vælhildin sethús við góðum útsýni, verða seld um nóg gott boð fæst.
Tlf. 332290

HÚS TIL SØLU
Stór hús í miðbýnum í Havn til sølu, húsini hava frálíkt útsýni og kunnu nýtast til eitthvørt endamál.
Tlf. 316320 ella 216320

HEY
Vit eru eitt ungt par, sum fegin vilja leiga eina íbúð í Tórshavn skjótast gjørligt, skulu byrja í skúla í september. Eru sera friðarlig og gjalda til tíðina.
Tlf. 373406

KAMAR YNSKIST
Friðaligur ungur maður søkir kamar nærhendis Læraraskólanum.
Tlf. 223397

ÍBÚÐ ELLA HÚS YNSKIST
til leigu í Eysturoynni – helst á Skála – max. 3500 kr. við ljós og hita. Vit eru friðarligt par við einum barni. Roykja og drekka ikki.
Tlf. 258915

TIL LEIGU
Eldri sethús á Eiði til leigu.
Tlf. 447097

ÍBÚÐ YNSKIST
Vit eru ung hjún, sum fegin vilja leiga eina íbúð í Havnini sum skjótast. Vit eru álítandi, fara væl um, roykja ikki og hava eingi børn.
Tlf. 262178 ella 333204

HÚS/ÍBÚÐ
ynskist til leigu í Eysturoynni.
Tlf. 260927

KAMAR YNSKIST
nær Kambsdali. Ungur drongur úr Havn ynskir kamar hetta skúlaáriðið. Farið til Havnar hvørt vikuskiftið.
Tlf. 224487 ella 314910

ÍBÚÐ YNSKIST
Eg eri ein einlig mamma sum søkir íbúð ella hús til leigu í Havn skjótast gjørligt. Ring á telefon nr 256031 ella 319684 umleið kl. 15.30.
Tlf. 256031 ella 319684

ÍBÚÐ SØKIST
Par við 2 børnum søkir íbúð í Havn. Má hava 2 kømur. Fara væl um og gjalda til tíðina.
Tlf. 255913 ella 251316

UNG KVINNA
ynskir lítla íbúð í Havn skjótast gjørligt. Havi fast arbeiði og farið væl um og gjaldi rættstundis.
Tlf. 254755 ella 211936, Annika

Bústaðarveiðan

Fyri nakrar av kundum okkara sóknast vit eftir sethúsum og grundøkjum, sum lúka niðan fyri nevndu ynskjum. Um tygum halda, at hetta svarar til og tygara, sum ætlanin er at selja, so set tygum í samband við okkum – møguliga hava vit rætta keyparan.
Vit átaka okkum at selja fasta ogn um alt landið.

Nr. 917
Stað: Sundalagi, Hvalvík/Streymnes
Slag av veiðu: Sethús
Stødd: Ongin treyt
Kostnaður: Mesti kostnaður kr. 1.000.000,-

Nr. 919
Stað: Alt hevur áhuga
Slag av veiðu: Sethús
Stødd: Lítil hús, helst við úthúsi
Ynskir: Skulu standa avsíðis
Kostnaður: Mesti kostnaður kr. 400.000,-

Nr. 920
Stað: Tórshavn
Slag av veiðu: Lítla íbúð
Ynskir: Helst Berjabrekku ella Undir Fjalli
Kostnaður: Mesti kostnaður kr. 800.000,-

Nr. 922
Stað: Tórshavnar kommuna, Leynar, Stykkið og Kvívík
Slag av veiðu: Sethús
Stødd: Familja v/ trimum børnum
Kostnaður: Mesti kostnaður kr. 800.000,-

Nr. 923
Stað: Hoyvík, Milum Gilja
Slag av veiðu: Sethús/tvíhús (raðhús)
Stødd: 3 kømur
Kostnaður: Mesti kostnaður 1.200.000,- kr.

Nr. 924
Stað: Norðasta Horn, Argir
Slag av veiðu: Sethús
Stødd: Til familju v/ fýra børnum
Kostnaður: 1.300.000,- kr.

Nr. 925
Stað: Tórshavn, Hoyvík, Argir
Slag av veiðu: Sethús/tvíhús (íbúð)
Stødd: Min. 60 m², minst 2 kømur
Kostnaður: kr. 1.000.000,-

Nr. 926
Stað: Tórshavn, Argir, Hoyvík, Norðasta Horn
Slag av veiðu: Sethús, íbúð
Stødd: Ongar treytir – tó minst tvey kømur
Kostnaður: kr. 800.000,-

Nr. 927
ta : Sandavágur
lag av vei u: Sethús
Stødd: 3–4 kømur
Kostnaður: 800.000,- kr.

Húsamekling

Sp/f Protek, Vaglið, Postsmoga 331, 110 Tórshavn,
Tlf. 319321, Fax 319331, E-mail: protek@post.olivant.fo
www.husamekling.fo
Avgreiðsla kl. 9-12 og 13-16
Keyp og søla av fastari ogn

ÍBÚÐ Í BÝTI
Par við barni søkja íbúð í Keypmannahavn. Møguleiki er at býta um við íbúð í Eysturbýnum í Havn. Ring 266894.
mail- bardur@bil.fo

ÍBÚÐ YNSKIST Í HAVN
Vit eru eitt ungt par, lesandi/fast starv, ið mangla íbúð. Fara væl um, roykja ikki. Max. 5.000 við øllum.
Tlf. 223333 ella 221184

ÍBÚÐ TIL LEIGU
96 fermetrar. 2 kømur, økur og stova, kostnaður 6.500 kr. + el og varma.
Tlf. 313339 best seint á kvøldi

HÚS TIL LEIGU
Hús í Vesturbýnum til leigu yvir longri tíðarskeið fyri kr. 7.500,- um mánaðin uttan olju og el. Økur, 2 stovur, 3 kømur og vaskikjallari. Sera gott útsýni og rúmligt uttanfyri.
Tlf. 315046 eftir kl. 17

HÚS Í NORÐDEPLI
Hús í Norðdepli til sølu um hóskandi boð fæst.
Tlf. 452138 ella 263323

LÍTIL ÍBÚÐ YNSKIST!
Vit eru eitt par, 40 og 32 ár, sum royna enn einaferð at finna eina íbúð max. 4.000 kr. við ljós og hita. Vit blivu húsvill 14. juli, íbúðin brendi.
Tlf. í løtuni 321026

TIL LEIGU
Eldri hús í miðbýnum í Havn til leigu. Leigan er 5.500 pr. mør. + ljós og hita. Depositum ynskist. Skriva nakrar reglur til hus_til_leigu@hotmail.com
hus_til_leigu@hotmail.com

HJÁLP
Ung hjún við barni søkja eftir íbúð ella húsi, á Streymoynni ella Eysturoynni. Vit mugu hava tak yvir høvdið áðren 01/09-2002.
Vinarliga ringið á tlf. 265535

ÍBÚÐ Í HAVN TIL LEIGU
Íbúð í eysturbýnum til leigu. Íbúðin er í tveimum hæddum, stoddin er um 80 fermetrar. Íbúðin er í einum rekkjuhúsum í fýra hæddum, við felags inngongd. Talan er um tær tvær ovastu hæddirnar. Á niðaru hæddini er stova og økur í einum og eisini eitt baðiverilsi. (Alt ný í standsett). Á ovaru hæddini er eitt stórt rúm (kamar).
Bill.mrk. 1399/7

KAMAR SØKIST
maður í 30'unum søkir kamar í Havn.
Tlf. 319020-321646

Dýr

EIGUR NAKAR
ein hvølp at lata okkum? Hann má gjarna vera Labrador. Vit eru eini ung hjún. SERA góð við djór.
Vinarliga ring 265128 (Elin)

TÍKAHVØLPUR
8 vikur gamal, kann fáast við at avheinta hann, bæði foreldrini lítil, mamman 3/4 puddil.
Tlf. 217459 ella 447459

DVØRGAKANINUNGAR YNSKJAST
Er tað nakar, ið hevur tveir dvørgakaninungar 8-9 vikur gamlir, ein av hvørjum kyni, til sølu, so ring
tlf. 255021

ER TAÐ NAKAR,
ið hevur ein hvølp, sum ikki verður ov stórur og sum eg kann fáa.
Tlf. 361560

TIL SØLU
Tarvskálvur – 3 mðr. – til sølu.
Tlf. 447097

SOS
Er tað nakar, sum hevur eitt marsvín til sølu?
Tlf. 257983

VILT TÚ HAVA KETTLING?
Vit hava tveir. Kom og sjggj og kela okkara MEGA fittu kettlingum (kettir). Tú kanst fáa ein. Men bert um tú verður góð við hann og passar hann væl. Teir blivu føddir 2. juli og eru reinligir. Vilt tú hava ein?
Ring 222131

TIL SØLU
Eitt dunnupar til sølu fyri 400 kr.
Tlf. 447486

HALLÓ TIT ØLL
Vit eru 3 sera fittir kettlingar sum onga mammu eiga. Hvør vil eiga okkum, vit eru bert 2 vikur gamlir.
Tlf. 317198 ella 221006

4 KETTLINGAR
kunnu latast í sept. 1 svartur, 1 reyður og 2 stríputur.
Tlf. 372268

Fundir

AÐALFUNDURIN
hjá Skála Ítróttarfelag verður í Bygdarsalinum 3. september 2002 kl. 20.00.
Nevndin

Húsarhaldstól

KØLI/FRYSTISKÁP
stødd ca. 135 h. 50 b. ynskist til keyps.
Tlf. 260334, Lise

KOMFÝRUR
AEG Komtence kann fáast við at avheinta hann í Fjalsgøtu 48.
Tlf. 311214 ella 264462, Elisabet

FRYSTIBOKS
Ein frystiboks bíliga til sølu.
Tlf. 311105

KOMFÝRUR TIL SØLU
Ein 2 1/2 ára gamal Blomberg komfýrur til sølu fyri 3800 kr. Nýprísur 9200 kr.
Tlf. 443208 ella 222358

KØLISKÁP
2 ára gamalt køliskáp v/ frystiboks, sum nýtt, til sølu fyri 2000 kr. Stødd: B: 49 cm H: 120 cm
Tlf. 318884/221638

ZANUSSI VASKIMASKINA
Ein Zanussi vaskimaskina sum er bert 2 1/2 ár, til sølu fyri 2.500 kr. Er í góðum standi.
Tlf. 210894

Innbúgv

UNGDÓMSSOFA TIL SØLU
Ein ungdómssofa til tveir persónar, men sum eisini kann dragast út til dupulta song til sølu fyri 1.000,- kr.
Tlf. 228959

BRÚKT INNBÚGV TIL SØLU
Náttborð 300,- stk. Sengur b. 90 x l. 200 cm. 600,- kr. stk. Skrivaraborð 300,- stk. Sofaborð 250,- kr. Minni sofaborð 150,-. Skáp 600,-
Tlf. 260334, Lise

MØBILSTOFF
minst 10 m, einlitað, ynskist til keyps.
Tlf. 260334, Lise

LÍTIÐ BRÚKT SOVISOFA
til sølu fyri 800 kr.
Tlf. 317437

TIL SØLU
Sofasett til sølu – 3-mans sofa + tveir stólar – til sølu fyri 2.000 kr.
Tlf. 221589

IVAR TRÆ-REOL
Lútviðgjørd reol av merkinum Ivar frá Ikea. Mát h x b x d 180x90x50 við 5 hillum og skuffum. Nýprísur 2.000 kr. til sølu fyri 1.000 kr.
Tlf. 315474

SONG TIL SØLU
Song 180 x 200 við ella uttan madrassur bíliga til sølu.
Tlf. 422082

TIL SØLU VEGNA FLYTING
Eitt lakerað spisiborð, 74 x 74 við 2 fløjum og 4 lútaðir spisiborðsstólar við grønum betrekki. Prísuppskot: 1500 kr.
Tlf. 254502 ella 447438

BÍLIGA TIL SØLU
Kommoda og spegl. Sofasett. Sovisofa og borð + 4 stólar.
Tlf. 223035

SOFABORÐ TIL SØLU
stødd 0,81 m x 1,28 m. hædd 49 cm.
Tlf. 317673 eftir kl. 18

ÓBRÚKT STÁLVASK
Óbrúkt stálvask 54 x 40 x 13 til sølu.
Tlf. 456454

TIL SØLU
Ein 2 1/2 mans sofa bíliga til sølu, ringjast kann á
tlf. 318811 eftir kl. 17.00

BOKSMADRAS VIÐ EYKAÚTGERÐ
Ein boksmadras við hvítum galvi og beinum verður seld fyri kr. 500. Nýprísur umleið 3000 kr.
ring 317376

HVÍTT BORÐVASK
av porselen til baðirúm til sølu.
Tlf. 373091

RANKEN ÚTGINGIÐ
Stelliið Ranken útgingið! Er nakar, ið eigur 3 sett kopp+skál+tallerk at selja mær, so vinarliga ring.
Tlf. 317425, Sára

Lutaseðlar

VINNARASEÐLARNIR
til lutaseðilin á eydnuhjólinum á skúlanum á Fossanesi, sum Norðdepils Hvannasunds Róðrarfelag hevði tann 13. august vóru hesir:
nr. 1) gulur 08729,
nr. 2) bláur 12769,
nr. 3) app. gulur 09397
nr. 4) grønur 08282,
nr. 5) ljósagrønur 07271,
nr. 6) grønur 08279,
nr. 7) gulur 03654,
nr. 8) bláur 12770.
Norðdepils Hvannasunds Róðrarfelag

VÁGA DANSIFELAG/BEITISHÚS
Vinningar, sum ikki eru heintaðir: nr. 7/2514, nr. 11/2263, nr. 13/077, nr. 15/2275, nr. 16/3697. Ringið 332595 aðrenn 15. sept.
Beitisnevndin

Matur

RABARBUR
Rabarbur til sølu fyri 12,- kr. kilo.
Tlf. 371063

Pløgg

HEVUR NAKAR
ein føroyskan mannfólkabúna, stødd L at selja mær?
Tlf. 447019 ella 217019

NEDERDEL
til nationaldragt í børnestof, str. 12 ár, sælges for 100 kr.
Tlf. 317075

LEVIS 555
1 par ubrugte Levis 555 04 mørkeblå, W28 - L32 til salg for 200 kr.
Tlf. 317075

KONFIRMATIÓNSKJÓLI
Vakur konfirmatiónskjóli stødd 46 og jakki stødd 48 biliga til sølu.
Tlf. 315960

KONFIRMATIÓNSKJÓLI
Sera vakur konfirmatiónskjóli við jakka og tilhoyri. Brúktur várið 02. Til sølu fyri 1000 kr. Str. 40 og ein frá 93 fyri 400 kr. str. 36.
Tlf. 254247

Lýsingartekstur

Lýsingin ynskist: 1 2 3 4 5 ferðir
(set X) undir teiginum:

❑ Akfør ❑ Amboð ❑ Arbeiði
❑ Barnaansing ❑ Barnaútgerð ❑ Bátaútgerð
❑ Bingo ❑ Brævaskifti ❑ Burturm./funnið
❑ Býli ❑ Bøkur ❑ Dansur
❑ Dýr ❑ Fundir ❑ Húsarhaldstól
❑ Innbúgv ❑ Lutaseðlar ❑ Leikur
❑ Matur ❑ Pløgg ❑ Samband
❑ Súklur ❑ Teldur ❑ Tónleikur
❑ Út-& sjónvarp ❑ Ymiskt ❑ .....

Lýsingarnar skulu vera okkum í hendi á miðdegi 2 dagar fyri útkomudag. T.v.s. at lýsing til leygardagsblaðið skal vera okkum í hendi hósdag á miðdegi. Lýsingarnar, ið gjaldast skal fyri, koma ikki í blaðið fyrrenn tær eru goldnar.

Sent hevur:
Navn:……
Bústaður:……
Bygd/býur:……
Tlf.: ……..

»Lýsingartorgið«
Sosialurin
Box 76
110 Tórshavn

Til frímerki